

*Njáll Sigurðjónsson starvaðist í fleiri á sum umbrótari á Sosialin - í tíðini, at blaðið varð »klipt og límað«. Her er hann í ferð við at bróta um eina síðu hjá Dagny Joensen, blaðkvinnu*

*»The Grand Old Lady« á Sosialinum, Ann Christiansen. Hon hevur seinni í ár sín 30 ára starvsdag á skrivstovuni á Sosialinum*



breyt.

Í 1974 verða húsini í Sjúrðagøtu 9 keypt til blaðhús. Tá varð ásannað, at nýmótans off-sett teknikkurin var framtíðin innan blaðútgávu, og tað var ikki ráðiligt at útbyggja prentsmiðjuna á Heygsbreyt, sum hevði slitnar og ótíðarhóskandi maskinur.

Um hetta mundið verður Sosialurin prentaður á prentsmiðjuni hjá Dimmalætting, meðan alt tilgerðararbeiðið varð gjørt á Sosialinum.



*Bethuel Z. Jensen á prentsmiðjuni. Hann var fyrsti prentarin á Sosialinum*



*Fyrsta manningin á Sosialinum. F. v.: Christioffer Hansen, Bethuel Z. Jensen, Mourentius Viðstein,(sitandi) og Anton Nielsen*

## Egna prentsmiðju og nýtt blaðhús

Í mars mánaði í 1982 flytir Sosialurin í nýggju blaðhúsini á Argjum, sum eru keypt og sett í stand til endamálið. Nú fekk blaðið aftur sína egnu prentsmiðju – hesaferð eina rotatiónsprentsmiðju, sum tá kundi prenta Sosialin í upp til 24 síður.

Hetta var eitt sera stórt framstig, og nú fór blaðið frá at koma út tvær reisur um vikuna til at koma út tríggjar ferðir um vikuna. Hetta var størri avbjóðing hjá starvsfólkunum – og nú bar betur til at bera aktuellari tíðindi. Samstundis sum flutt varð út á Argir varð navnið á blaðnum broytt, so blaðið nú kom at eita Tíðindablaðið Sosialurin. Hetta var helst fyri at leggja dent á, at blaðið var eitt tíðindablað heldur enn eitt politiskur boðberi.

Hesi 25 árini síðani 1982 er nógv hent á blaðøkinum í Føroyum. Nógv bløð, sum vóru tá, eru ikki longur, og Sosialurin er vaksin sera nógv hesi árini til í dag at hava tikið Dimmalætting í støðd og útbreiðslu, meðan Dimmalætting tá var einasta nógv størsta blaðið í Føroyum.

Tá flutt var út á Argir í 1982 vóru útgávudagarnir øktir frá tveimum til tríggjar.

Seinast í áttatiárunum – tá kreppan fór at kennast – máttu stig takast til tess at standa í móti minkandi inntøkunum. Í staðin fyri at repa seglini, valdi leiðslan á Sosialinum heldur at økja um útgávutalið úr trimum upp í fimm ferðir. Hetta var gjørt á vári í 1990.

Fyri at hetta skuldi kunna bera til var neyðugt at rationalisera arbeiðsgongdina. Tí vóru teldur á fyrsta sinni tiknar í brúk í blaðarbeiðinum. Keyptar vóru Macintosh teldur til øll blaðfólkini og til setifólkini. Við at prenta út statsin á A-4 pappír slapst undan allari arbeiðsgongdini við at setifólkini skuldu seta eftir manuskripti frá blaðfólki. Lím og saksur var tó framvegis í brúki, men 10 ár eftir hetta – í 1999, vóru saksur og lím endaliga pakkað niður, og verður blaðið í dag í øllum smálutum framleitt digitalt – ella talgilt.

## Prentsmiðju saman við Dimmalætting

Í 2000 løgdu Sosialurin og Dimmalætting niður prentsmiðjurnar og stovnaðu partafelagið Prentmiðstøðina. Tær bestu maskinurnar hjá Sosialinum og Dimmalætting vórðu settar saman, samstundis sum nýggjar maskinur vórðu keyptar. Hetta er í dag einasta rotatiónsprentsmiðja í landinum – og tískil tann einasta blaðprentsmiðjan. Henda prentsmiðja klárar uttan trupulleikar at nøkta tørvin á allari blaðprenting í Føroyum í dag. Á hesi prentsmiðju ber til at prenta Sosialin í 56 síðum, harav 24 síður við liti. Um tørvur er á størri blað ella fleiri litsíðum, so ber til at prenta blaðið í tveimum ella fleiri umførum, og tá økist síðutalið tilsvarandi. Prentmiðstøðin heldur til í húsum Dimmalættingar, men har er vorðið ov trongligt, og verður í hesum døgum arbeitt við at útvega Prentmiðstøðini nýggj og tíðarhóskandi høli.

## Sosialurin gerst heimsumfatandi

Tá Føroyar í 1996 vórðu knýttar upp í internetið, vistu vit ikki, hvussu stóra ávirkan hetta fór at fáa á blaðarbeiðið – ella miðlaarbeiði sum heild. Í 1997 fóru vit í holt við InternetSosialin, har vit á internetinum kundu lesa dagsins Sosialin. Henda skipan er støðugt útbygd og er vorðin ein alsamt meira integreraður partur av arbeiðinum hjá fólkinum á Sosialinum og útbreiðsluni av blaðnum.

Tað, at fólk alla staðni kring heimin kunnu fáa tíðindi í Sosialinum samstundis hevur stór perspektiv við sær.

Nýggi samskiftishátturin við internetinum hevur eisini lætt munandi um arbeiðið hjá blaðfólki og myndafólki okkara. Nú er lagað manni at skriva ella taka myndir hvar sum helst í landinum ella heiminum og fáa bæði tekst og myndir í blaðið beinanvegin. Soleiðis er Sosialurin eisini skipaður við deildum í Sandvík og í Klaksvík umframt ta rullandi redaktiónina.



*Tummas Jensen úr Fuglafirði við setimaskinuna*




*Jarleivur Hilduberg varð settur sum prentari á nýggju prentsmiðjuni í 1982*



*Høgni Djurhuus, blaðmaður við skrivimaskinuna*